gult cyan magenta svart

VI‹MERKINGAR

25 milliónir til løgtingshús me›an sálarsjúk eru heimleys

Svenning av Lofti
forma›ur í Sinnisbata

Millum teirra, i› lótu vi› seg koma eftir at eg í morgunrásini í útvarpi Føroya t‡smorgunin hev›i tala› søk teirra sálarsjúku, var ta› ein klaksvíksingur, sum sendi mær eitt telefax. Hann skriva›i: “Kanska kundu tygum skoytt óney›ugu “umvælingina” av tinghúsinum uppí endan.”

Ja, ta› kundi eg havt gjørt, men í tí løtuni kom ta› mær ikki til hugs.

Sum eg havi skilt so eru 25 milliónir settar av á fíggjarlógini fyri 2001 til umbygging av telefonstø›ini vi› Tinghúsvegin til umsitingarhøli hjá løgtinginum.

Hetta ver›ur gjørt uttan at blunka, samstundis sum 25-30 fólk eru stranda› á psykiatrisku deildunum á landssjúkrahúsinum, tí tey ongan hóskandi bústa› hava at fara í. Hesi fólk eru í veruleikanum í húsavar›haldi á psykiatrisku deild.

Men ta› nívir ikki Føroya løgting. Jú onkran! Vónandi fleiri!!

Teir hækka›u sínar egnu lønir - fyri milliónaupphæddir!

Teir umvældu tinghúsi› fyri millióna-upphæddir!

Teir hava sett 25 milliónir av á komandi fíggjarlóg til egnar skrivstovur!

Men at sálarliga sjúk fólk eru heimleys nervar tey ikki! Til tey eru eingir pengar.

Vit hava skriva›! Vit hava tala›! Vit hava mótmælt!

Ta› er sum at sláa í eina d‡nu!

Tinglimir! Vakni› - vakni› nú.

Seti› nógvan pening av til tey sálarsjúku! Og geri› ta› nú!!!

Aling og umhvørvisárin

(Vi›merkingar til or›askifti um aling og dálking)

Jan Sørensen,
lei›ari Havlívfrø›iliga royndarstø›in (Biofar)
Kaldbak 07.12.2000

Í sambandi vi› at Heilsufrø›iliga Starvsstovan hevur lagt fram frágrei›ingina ”Opdræt og miljø på Færøyene” (Akvaplan-niva) hava fjølmi›lar og onnur gjørt rei›iliga nógv burturúr, og fari eg tí at gera nakrar vi›merkingar til ta›, sum er komi› fram í seinastuni.

Havlívfrø›iliga royndarstø›in (BIOFAR) hevur kanna› øll alibrúk í Føroyum (31 íalt), og ein partur av hesum frágrei›ingum er brúktur til at gera ni›urstø›ur í ”Opdræt og miljø på Færøyene”. Royndarstø›in hevur tó ikki á nakran hátt tiki› lut í at gera ni›urstø›urnar í hesi frágrei›ing, sum eigur at ver›a lisin vi› varsemi.

Einki man ver›a at ivast í, at vit øll ynskja okkum eitt reint og sunt umhvørvi, og at vit øll eiga at s‡na fyrilit og ábyrgd, solei›is at vit vi› gó›ari samvitsku kunnu lata landi› í hendurnar á okkara eftirkomarum.

Ta› skerst tó ikki burtur at alt virksemi dálkar, sumt meira og sumt minni. Solei›is er eisini vi› aling, og spurningurin er tí ”Hvat er ov nógv”? Spurningurin eigur tó ikki at standa einsamallur men haldast upp í móti vinnuligu ágó›unum hetta virksemi gevur. Tó so, at varandi ska›a á umhvørvi› eiga vit trey›ugt ella ongantí› at gó›taka.

Okkara ni›urstø›a eftir at hava kanna› øll alibrúk í Føroyum er, at sjónliga dálkingin frá aling í flestu førum ikki sæst longur enn 10-20 m úr hvørjum alringi. Tó kann rei›iliga nógv tilfar hava hópa seg upp undir ringunum, og ta› eru eisini størri økir har ábendingar eru um at botnurin er strongdur (neyvari kanningar mugu tó gerast fyri at sta›festa hetta og orsøkina).

Vit eiga at hava í huga, at dálking vi› avlopsfó›ri og skarni ikki gevur varandi ska›a á umhvørvi›. Er talan um minni mongdir vil natúrliga samansetingina av botnd‡rum broytast fyri sí›an heilt at hvørva, tá mongdirnar gerast størri. Gevast vit vi› dálkingini vendir gongdin, og botnurin gerst aftur sum hann var. Undir gó›um umstø›um s‡nist hetta at taka 1-2 mána›ir, me›an í ógvusliga dálka›um stø›um, har umstø›urnar ikki eru av teimum bestu, kann hetta taka upp í umlei› 2 ár ella meira.

Trupulleikin vi› at tilfar legst á botn kemur av, at botnurin ikki klárar at umseta tilkomna tilfari› nóg skjótt. Umhvørvismyndugleikar uttanlanda halda vanliga, at ta› er betur at dálka eitt størri øki eitt sindur, enn ta› er at dálka nógv á smærri økjum, tí at tilkomna tilfari› skjótari ver›ur umsett á størri økjum.

Her haldi eg, at ta› er t‡dningarmiki› at skilja ímillum umhvørvi› sum heild, og uppvakstrarumhvørvi› hjá alifiskinum. Umhvørvi› sum heild er øki› har alibrúki› liggur (eitt størri øki sum t.d. ein partur av einum fjør›i, ella ein heilur fjør›ur), me›an uppvakstrarumhvørvi› hjá alifiskinum er nærumhvørvi› inni vi› og undir ringunum. Øll alibrúk hava fingi› tilluta› eitt ella fleiri øki at ala á og hesi øki mugu metast sum framlei›sluøki og harvi› útsetast fyri eini ávísari dálking. Onkursvegna eigur hetta at havast í huga tá metast skal um markvir›i fyri hvussu nógva aling umhvørvi tolir.

Alarin hevur sjálvsagt áhuga í at kenna umstø›urnar kring brúki› fyri at hava eitt gott framlei›sluumhvørvi, me›an umhvørvismynduleikar hava áhuga í at kenna umhvørvi› sum heild fyri at meta um árinini, sum standast av alingini. Skulu regulerandi tiltøk setast í verk, eigur at ver›a hugt eftir, hvussu vit fáa sum mest burturúr bæ›i umhvørvisliga og vinnuliga. Reguleringstiltøkini eiga at tryggja, at umhvørvi› ikki ver›ur strongt meira enn eitt vist og hinvegin ikki avmarka fullar framlei›slumøguleikar innan fyri teir karmar umhvørvi› tolir uttan at fáa varandi ska›a.

Stø›an í dag er sera trupul, tí vit í Føroyum ikki hava vi›gjørt hesi vi›urskifti. Vit hava brúk fyri at stungi› ver›ur út í korti›, bæ›i hvussu a›allinjurnar eiga at vera og hvussu meira neyvt skal farast til verka. Her er sera t‡dningarmiki›, at ein neyv vi›ger› ver›ur frammanundan, og at allir partar ver›a hoyrdir, solei›is at vit fáa eina vælvirkandi skipan frameftir og at vit ala sum mest undir umhvørvisforsvarligum fyritreytum.

Føroya Landsst‡ri fremur ágang móti Føroya fólki vi› n‡ggjari pensjónsrammulóg

Julius Djurhuus
Vættrastígur 5 Tórshavn

Í løtuni arbei›ir landsst‡ri› vi› einum pensjónslógaruppskoti, i› bart út sagt kann kallast ein vanærulig vi›fer› av verandi uppspararum.

Ætlanin er, at øll skulu, í sí›sta enda, inngjalda 10% av árslønini til eina lívrentu. Hetta merkir, at útgoldi› ver›ur ávíst útgjald aftur, so leingi ein livir. Á sama hátt sum verandi pensjón.

Sagt ver›ur, at tey, i› hava a›ra pensjónsuppsparing, sleppa undan tí tvungna inngjaldinum og fáa innkravdan pening útgoldnan aftur. Tó bert um serstakar treytir ver›a uppfyltar. Tann eina treytin er, at fólk fáa sær eina lívrentu uppsparingarskipan.

Vi› ø›rum or›um strikar landsst‡ri› verandi kapitaleftirlønartryggingar, i› gjørdar eru sambært rentutryggingarlógini. Hesa striking fremur landsst‡ri› ikki beinlei›is vi› einari lóg, men óbeinlei›is vi› at noy›a fólk at siga slíka skipan frá sær. Vit ver›a noydd at broyta okkara verandi kapitaleftirlønir til lívrentu uppsparing. Hetta er lógarsmí› tá ta› er frekast.

Landsst‡ri› sigur, at arbei›smarkna›urin frítt skal samrá›a seg til pensjónsskipanir, so at hesar líkjast tí, i› landsst‡ri› setur í verk. Hvat frítt er vi› hesum, tá landsst‡ri› longu hevur sett eina avger›andi treyt?

Landsst‡ri› skulkar sær undan tí ábyrgd, ta› hevur vi›víkjandi verandi rentutryggingarlóg. Teir strika kapitaleftirlønartryggingina óbeinlei›is, tí teir vita, at um verandi lóg beinlei›is ver›ur strika›, so koma allar kapitaleftirlønartryggingar beinanvegin til útgjaldingar. Væl at merkja uttan at lata 35% ella 40% avgjald til landskassan.

Í rentutryggingarlógini stendur, at 40% avgjald ver›ur lati› til landskassan, um útgjald fer fram í úrtí›. Um vit brúka argumentini hjá politikkarunum, so skulu vit fylgja andanum í lógini, meiningini vi› lógini, um ivi er um hana. Meiningin vi› lógini er, at avgjald ver›ur lati›, tá tryggingartakarin uppsigur avtaluna. Einki stendur um hvat avgjald, i› latast skal, um landsst‡ri› uppsigur avtaluna. Vi› tí avger›andi treyt, i› ætlanin er at seta í verk vi› n‡ggju pensjónslógini, hevur eingin rá› at hava kapitaleftirlønartrygging. Ein er noyddur at siga hana frá sær. Sostatt hevur landsst‡ri› í roynd og veru uppsagt verandi kapitaleftirlønartrygging.

Hvørjar eru so tær almennu grundgevingarnar fyri n‡ggju rammulógini?

Ein grundgevingin er, at um 20 ár orkar føroyingurin ikki at gjalda pensjónirnar, i› tá ver›a. Um 20 ár, og allíkavæl skal máli› skundast ígjøgnum nú uttan at ney›ug trygd er fingin fyri, hvat i› henda skal vi› verandi kapitaleftirlønaruppsparingum. Eg fái meg illa at trúgva hesum.

Onnur grundgevingin er, at verandi kapitaleftirlønartryggingar geva ein stættamun, tá fólk ver›a pensjonistar. Hvat ger ta› um grannin hevur meiri pening enn ein sjálvur? Er kanska talan um øvundsjúku, i› her drívur verki›? Hví bøtir landsst‡ri› ikki um verandi møguleikar, ísta›in fyri at skipa solei›is fyri, at øll noy›ast undir somu skipan?

Grundarlagi› undir verandi kapitaleftirlønum ver›ur vi› hesum tiki› burtur, og ta› vi› sera ivasomum grundgevingum. Ein fær ta fatan, at talan heldur er um at keypa sær stemmur frá pensjonistunum.

Vi› verandi skipan fer eftirverandi uppsparing, i› er á kapitaleftirlønartryggingum, til lívsarvingarnar, um ein fellur frá á›renn alt er útgoldi›. Vi› n‡ggju skipanini fellur einki til lívsarvingarnar, men fer beinlei›is í eina pulju, so a›rir pensjonistar kunnu fáa ágó›an av hesum. Hví skulu okkara egnu eftirkomarar ikki fáa henda ágó›a? Ta› fáa teir vi› verandi lóggávu.

Ta› eigur ikki at bera til í einum nútímans samfelagi, fyrst at leggja serstakt avgjald á fólk og sí›ani aftaná finna út av, hvussu peningurin skal brúkast. Hetta var í hvussu so er upprunaliga ætlanin, sum so var› broytt í gjár. Nú er ætlanin at innkrevja pensjónsgjaldi› fyrstu fer› tann 1. oktober næsta ár. Føroyar høvdu dumpa› sum rættarsamfelag, um innkrevjingin var› sett í verk tann 1. januar uttan at ney›ug útgjaldslóg var› gjørd á›renn.

Ta› ver›ur oftani sagt, at vit hava heimsins einfaldastu skattaskipan. Mannagongdin í hesum máli vísir okkum, at skipanin eisini er heimsins vandamiklasta. Hon er so einføld, at n‡ggja innkrevjingin kann setast í verk eftir 10 til 15 arbei›sdøgum. Spurningurin er, um vit kanska skuldi havt eina lóg, i› skal for›a fyri at okkara politikkarar solei›is misn‡ta skipanina.

gult cyan magenta svart

ítróttur

Nr. 239 • t‡sdagur • 12. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Kyndil-VÍF 28-28 (16-16)

Klassikarin var› ein gysari

Kyndil gjørdist fyrsta li›i›, sum tók stig frá VÍF hetta kappingarári›, tá teir í einum sonnum braki spældu javnleik móti oddali›num

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Ta› mundi vera vi› stórum spenningi, at bæ›i havnarmenn og vestmenningar fóru í Ítróttahøllina uppi á Hálsi sunnudagin.

Eftir stigatalvuni at døma, var kanska ikki so nógvu spenningur um dystin, men avrikini hjá Kyndli seinastu tí›ina (burtur sæ› frá H71-dystinum) bo›a›u tó frá, at okkurt kundi spyrjast burtur úr dystinum. Eisini hóast ta› var VÍF, sum stó› hinumegin mi›linjuna.

Toga›u bá›ar vegir

Longu fyrstu løtuna fingu ásko›ararnir eisini fyrstu ábendingarnar um, at talan av sonnum kundi gerast um ein stórdyst.

VÍF leg›i bragdliga fyri, og vi› vanliga fer›mikla spæli sínum royndu teir nærum at kvæla Kyndil. Kyndilsmenn tó skjótt fatur á rætta endanum, og hóast ta› var VÍF, sum var á odda hesa løtuna, so var nervin tó framvegis sterkur í dystinum.

Ta› eydna›ist eisini at toga seg fram um vestmenningar, tá hálvleikurin var á lei› hálvrunnin. Vi› stórspæli frá serliga Rúna Poulsen og Bjarna Wardum í álopspartinum, og vi› væl skipa›um verjuspæli lá Kyndil nú brádliga greitt omaná.

Málmansavriki› frá Jens lá heldur ikki á láni, og ta› var sjónligt á andlitsbrøgdunum hjá vestmenningunum, at talan væl kundi gerast um fyrsta tapi› hetta kappingarári›.

Hev›i ta› ikki veri› fyri Bár› í málinum, so kundi munurin eisini gjørst væl størri enn tey f‡ra málini, sum ta› ta einu løtuna var talan um. Millum anna› fekk Kyndil onga úrtøku úr tveimum brotskøstum hesa løtuna, og eisina a›rar bjargingar vóru á skránni frá málverjanum, sum tóktist illa nøgdur um avriki› hjá li›feløgunum úti á vøllinum.

Eftir at hava gjørt n‡tslu av sínum time-out, eydna›ist tó vestmenningum at toga seg inn aftur á Kyndil, solei›is at teir høvdu toga› seg upp á javnt, tá fari› var› til hálvleiks.

Eingin mansverja

Var talan um ein javnan og spennandi fyrra hálvleik, so var seinni hálvi tímin ta› ikki minni.

Talan var ongantí› um meira enn tvey mál á muni, og tann sannroynd, at Kyndil hev›i lei›sluna f‡ra fer›ir, me›an VÍF sjey fer›ir fekk lagt seg framum, sigur eisini alt um, hvussu javnt ta› leika›i á.

Fyri ásko›ararnar var ta› heldur ikki minni hugaligt, at hvørgin av venjarunum valdi at gera n‡tslu av nakrari mansverju, solei›is sum ta› ofta ver›ur gjørt í jøvnum dystum.

Tr‡sti› vaks

Sum dysturin lei›, var sjónligt, at tr‡sti› á leikararnar á bá›um li›um gjørdist alsamt størri.

Ásko›arafjøldin kóka›i, og meira enn tí einu fer›ina vildu hesi hava onkran dómin broyttan, ella var ta› kanska okkurt, sum ikki var› dømt.

Leikararnir tóktust tó ikki at taka sær tign av hesum, men royndu í hvør sínum lag at avgera dystin.

Nógv var› lagt fyri í bæ›i verju og álopi, og spurningurin tóktist bara vera, hvørt ta› fór at eydnast ø›rum partinum at geva mótstø›uni mønustingin.

Høga leikfer›in merkti kanska eisini, at mø›in fór at gera seg galdandi.

Kyndil misti nakrar heldur óney›ugar bóltar í álopsstø›u, men tíbetur fyri teir, gjørdu vestmenningar ta› sama, so leysir sluppu teir á ongan hátt.

Heilt spennandi mundi ta› gerast hjá ásko›arunum, tá Kyndil fekk brotskast, tá stø›an var 27-27. Eingin leikari tóktist at vilja halda seg framat, men endin gjørdist tó, at Hans Áki gjørdi bart, og sendi í kassan.

Áki fekk tó javnvág í roknskapin aftur, men Kyndil hev›i framvegis gó›an minutt til seinasta álopi›. Ein misskiljing førdi tó vi› sær, at bólturin var› tveittur burtur, og so fór VÍF í álop.

Úrsliti› av seinasta álopinum var› ein roynd frá tríggja metra strikuni, men hóast nær vi›, so eydna›ist ikki Sámali at fáa hendan bóltin í kassan.

Bá›ir partar nøgdir

Eftir dystin tóktust leikarar á bá›um li›um at vera væl nøgdir um úrsliti›.

Vestmenningar, tí ta› eftir øllum at døma ver›ur ókeypir hjá teimum vi› hesum stigamissinum. Tá stigini ver›a b‡tt, ver›ur runda› uppeftir, og missa teir ikki onnur stig, byrja teir endaspæli› vi› fullum stigatali›.

Kyndilsmennn vóru eisini væl nøgdur um avrik sítt. Teir høvdu prógva, at ta› ikki er ógjørligt at taka vestmenningar. Ikki minst man hetta hava stóran t‡dning hjá teimum sálarliga.

Ásko›ararnir – Jú teir kundu heldur ikki anna› enn vera nøgdir. Teir hvødu veri› vitni til eitt satt brak av einum hondbóltsdysti, har spenningurin alla tí›ina var í hæddini. At dysturin so eisini var› avgreiddur í gó›um ítrottaranda mundi heldur ikki gera heildarmetingina verri.

Allir gjørdu sítt

Ta› kann kanska vera heldur torført at toga nakran einstakan leikara fram um a›rar í dystinum, tí fyri ein stóran part var talan um eitt satt li›avriki hjá bá›um pørtum.

Ta› er tó merkisvert, at Áki Olsen gjørdi tíggju mál, nú hann av álvara tykist vera komin fyri seg. Í onkrum førum sá ta› nærum ov lætt út hjá honum, men skoti› hevur hann sum fáur. Eisini Ingi hev›i ein gó›an dag, og fekk hann pláss at skjóta, var› hetta eisini gjørt uttan naka› roks. Hjá heimali›num var ta› kanska serliga Bjarni, sum gjørdi nógv um seg í álopspartinum, men eisini er vert at leggja til merkis, at verjan nú tkist at vera komin rættiliga upp á pláss. Samspæli› vi› Jens Skipagøta riggar eisini betri og betri, og tá hann so eisini í fleiri førum bjarga›i royndum frá einsamøllum vestmenningum, lá hansara partur so avgjørt ikki eftir.

Teir leikarar, sum ikki eru nevndir her, skulu tó avgjørt ikki gloymast. Teirra leiklurtur lá so avgjørt ikki eftir.

Heldur kann ta› sigast solei›is, at samanlagda úrtøkan av royndum teirra gjørdist, at 300 ásko›arar vór›u vitni til besta dystin higartil hetta kappingarári›.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Kyndil: Bjarni Wardum 7(2), Rúni Poulsen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 5(1), Jónleif Sólsker 3(1), Heini Bendtsen 3, Uni Wardum 2, Regin Petersen 1, Janus Einar Sørensen 1
VÍF: Áki Olsen 10, Ingi Olsen 8, S´mal Joesen 5, Johnny Joensen 3, Agnar Joensen 1, Martin Hummeland 1
Brotskøst: Kyndil 7, VÍF 1
Útvísingar: Kyndil 4, VÍF 3
Dómarar úr Tjaldri: Dánjal Hansen og Kári Hansen. Hóast fer›mikil og spennandi, so tóktist dysturin teimum lættur at døma. Ikki minst, tí spælararnir á bá›um li›um heldur royndu at n‡ta orkuna til at spæla hondbólt, heldur enn at s‡na misnøgd mótvegis dómarunum.

Fyri vestmenningar man ta› kennast hugaligt, at Áki Olsen nú er um at koma rættiliga fyri seg. Sunnudagin skeyt hann 10 mál

Mynd: Álvur Haraldsen